## Praktiskt

Glóðin hevur telefonnr. 280011. Telefontíð er millum kl. 16 og 21 hvønn týsdag og hósdag.

Tann, sum vil hava eina samtalu ella hevur spurningar, verður biðin um at nýta hetta telefonnummar í tilskila tíðarskeiðnum.

Tænastan er ókeypis. Hevur onkur hug at stuðla tænastuni við gávu, kann upphæddin flytast á kontu 132.564-9 í Føroya Sparikassa. Flytingin skal vera markað "Glóðin". Gávur vera nýttar til at bøta um tænastuna á ymsan hátt.



lívdin
– í lívd hins hægsta

GLÓÐIN

## Endamál

Ein partur av hugsjónini hjá Lívdini er, at hon skal vera ein samkoma, har øll tey, sum eru sorgarbundin, niðurboygd, vónleys og friðleys, kunnu finna kærleika, gleði, vón og frið í Jesusi Kristi. Tænastan Glóðin er skipað fyri at fremja hesa hugsjón.



## Hvussu?

Ein bólkur av kvinnum og monnum bjóða seg undir tagnarskyldu til at lurta, samtala og biðja við fólki, sum stríðast við eitt hvørt. Hvør enn trupuleikin er, kunnu fólk venda sær til Glóðina. Sjálvt um fleiri av fólkunum í Glóðini hava viðkomandi útbúgvingar, er ikki talan um professionella terapi, men heldur um eitt lurtandi oyra og ein opnan favn.

Umframt vanligar bíbilskar meginreglur arbeiðir Glóðin m.a. út frá kognitiva ástøðinum. Málið við kognitiva framferðarháttinum er ikki at hugsa jaligt, men realistiskt. Dentur verður lagdur á framtíðina og ikki tað sum farið er.

Menniskja plágast ikki av veruleikanum, sum hann er, men av síni egnu fatan av veruleikanum (sitat).

**Allýsing:kognitión = hugsan/tankagongd*

## Hvar?

Samrøður fara fram á Brekku 3, sum er grøni bygningurin aftanfyri Mjólkavirkið í Hoyvík.

## Hvør?

Sum ein partur av hirðatænastuni er tænastan fyrst og fremst ætlað teimum, sum hava gjørt Lívdina og Hebron á Argjum til sítt andaliga heim. Í tann mun orka er til tað, eru onnur eisini vælkomin.